## Eftirskúlin í Hvalba og miðnámsútbúgvingar

**Visjón 2015 leggur upp til, at øll ung í Føroyum skulu ogna sær eina miðnámsútbúgving. Hetta merkir, at eisini tey, sum av onkrari grund ikki fingu nýtt møguleikan í fyrsta umfari, eiga at fáa møguleikan at ogna sær eina miðnámsútbúgving. Tí er eftirskúlin eisini ein týðandi partur av visjón 2015.**

### Visjón 2015 og Eftirskúlin

Í løgmansrøðuni í 2005 segði løgmaður í sambandi við visjón 2015, at: *"Okkara mál er tí: at allir fólkaskúlanæmingar fáa eina góða og mennandi grundútbúgving, sum tryggjar, at teir hava førleika at fara víðari til eina miðnámsútbúgving, at allir ungdómar fáa eina miðnámsútbúgving ella yrkisútbúgving, at minst helvtin av okkara ungdómi fær hægri útbúgving"*. Á hesum økinum eru føroyingar heilt týðiliga eftirbátar í mun til teir norðurlendsku grannarnar, sum vit plaga at samanbera okkum við. Onnur Norðurlond eru komin tætt at hesum málinum, men í Føroyum restar nógv meira í at náa setta málið.

Skal málið, sum Løgmaður setti fram í løgmansrøðuni í 2005, náast, so er neyðugt, at næmingarnir, sum fara úr fólkaskúlanum, eru til reiðar at taka eina miðnámsútbúgving. Tað er ikki nóg mikið at skapa pláss og fysiskar umstøður til øll ung á miðnámsskúlunum, sum ynskja at taka eina miðnámsútbúgving. Skal málið náast, so er neyðugt at geva øllum ungum teir fakligu, sosialu og menniskjansligu førleikarnar, sum skulu til fyri at gjøgnumføra eina miðnámsútbúgving. Ein vælvirkandi eftirskúli, sum mennir næmingarnar bæði fakliga, sosialt og menniskjansliga, er eitt av amboðunum, sum norðurlendsku grannarnir hava nýtt til at náa málinum, men í Føroyum er einki veruligt tilboð til næmingar og foreldur, sum av ymiskum grundum hava tørv á ella ynskja onnur útbúgvingartilboð, enn tey vanligu 10. floks tilboðini. Í Danmark eru 243 eftirskúlar ymsastaðni í landinum og í Føroyum er ætlanin at seta ein eftirskúla á stovn í Hvalba. Spurningurin er, hvussu stórur tørvurin er á einum tílíkum eftirskúla í Føroyum.

Her ber til at gera nakrar samanberingar við donsk viðurskifti.

### Tørvurin á einum eftirskúla í Føroyum

Formligga og løgfrøðiliga fyrireikingararbeiðið, sum liggur til grund fyri, at ein eftirskúli kann setast á stovn í Føroyum er gjørt og ein arbeiðsbólkur, sum hevur tikið stig til at fáa ein eftirskúla settan á stovn í Hvalba, hevur eisini sitið og arbeitt við málinum. T.d. hevur arbeiðsbólkurin í 2005 fingið gjørt eina kanning av búskaparliga týdninginum av at seta ein eftirskúla á stovn í Hvalba og í september 2006 hevur bólkurin gjørt eitt uppskot til ein tílíkan skúla. Metingin er, at skúlin kemur at kosta umleið 80 milliónir krónur at byggja, harav skal landskassin rinda helvtina, og 10 miljónir árliga at reka, harav landskassin rindar 70%. Ætlanin er, at skúlin, sum skal kunna hýsa 80 næmingum, skal vera liðugur í 2009. Í føroysku lógini um eftirskúlar frá 17. mai 2005 er ásett, at ein treyt fyri at seta á stovn ein tílíkan eftirskúla í Føroyum er, at í minsta lagi 16 næmingar eru innskrivaðir fyri 1. september árið undan byrjanarárinum og eftir trimum árum skulu 48 næmingar ganga á skúlanum. Spurningurin er sum nevnt, hvussu stórur tørvurin er á einum tílíkum eftirskúla í Føroyum. Her hevur nevndin gjørt eitt stórt kanningararbeiði.

Í 2005 tóku 34,2% av øllum teimum 16 ára gomlu í Danmark 10. flokk. Av hesum gingu heili 70% á eftirskúla. t.e., at 22,8% av teimum 16 ára gomlu gingu í 10. flokki á eftirskúla. Tað kundi bent á, at stórur tørvur eisini er á einum eftirskúla í Føroyum.

Verða tølini í Danmark nýtt sum grundarlag undir eini meting av tørvinum á einum eftirskúla í Føroyum, so er tað týðiligt, at tørvurin enntá er nógv størri enn teir 48 næmingarnir, sum nevndir eru í føroysku lógini. 34,2% (sum er parturin á 16 ára gomlum í Danmark, sum taka 10. flokk) av teimum 16 ára gomlu í Føroyum (t.e. tey 873 føddu børnunum í Føroyum í 1988), sum sambært donsku tølunum skuldu havt gingið í 10. flokki í Føroyum í 2005, er 299 næmingar. Um - eins og í Danmark - 70% av hesum fóru á eftirskúla, so høvdu 200 næmingar tikið 10. flokk á einum føroyskum eftirskúla í 2005. Veruleikin er kortini tann, at av teimum 767 føroysku næmingunum, sum tóku 9. flokk í 2002, tóku 578 næmingar 10. floks prógv í Føroyum í 2003. Hetta merkir, at um danska lutfalli (70%) hevði verið galdandi í Føroyum í 2003, so høvdu 395 næmingar tikið 10. flokk á einum føroyskum eftirskúla. Tað sigur nakað um møguliga næmingagrundarlagið hjá einum føroyskum eftirskúla. Men tað sigur neyvan alt um føroyska eftirskúlatørvin.

Her er sjálvandi ikki tikið hædd fyri, at nógvir føroyskir næmingar fara til m.a. Danmarkar á eftirskúla og at tørvurin á einum eftirskúla ikki endiliga er tann sami í Føroyum, sum hann er í Danmark, men tað kann ikki vera nakar ivi um, at stórur tørvur

er á einum eftir skúla í Føroyum. Hartil kemur, at hóast tað kann roknast við, at føroyskir næmingar framvegis høvdu farið til m.a. Danmarkar á eftirskúla eftir at føroyski eftirskúlin varð farin at virka, so er tað væl hugsandi, at útlendskir næmingar høvdu leita sær uppihald á einum føroyskum eftirskúla. Tað er heldur einki at ivast í, at ein eftirskúli í Hvalba hevði havt stóran týdning fyri Hvalba, Suðuroynna og allar Føroyar sum heild.

**Eftirskúlin og miðnámsútbúgvingarnar**

Tað er sum nevnt í byrjanini ætlanin hjá landsstýrinum, at allir føroyskir ungdómar skulu ogna sær eina miðnámsútbúgving, men gongdin tey seinastu árini sær ikki góð út hesum viðvíkjandi. Miðnámsskúlarnir hava stríðst við eitt vaksandi tal av næmingum, sum gevst áðrenn próvtøkan er lokin. Fráfallið millum tey, sum byrja uppá eina miðnámsútbúgving, hevur v.ø.o. staðið í stórum vøkstri tey seinastu árini. Hesir næmingarnir tykjast ikki vera motiveraðir til at gjøgnumføra eina miðnámsútbúgving. Harafturat kemur tann bólkurin av næmingum, sum ikki hevur eitt so gott miðaltal við í førninginum úr fólkaskúlanum, sum krevst fyri yvirhøvur at sleppa inn á ein miðnámsskúla. Hesir báðir trupulleikarnir mugu loysast, um ætlanirnar hjá Landsstýrinum á útbúgvingarøkinum skulu røkkast.

Tað er lítið at ivast í, at ein eftirskúli, kann vera ein partur av loysnini. Ein eftirskúli, sum er skipaður sum ein vistarskúli, gevur næmingunum møguleika fyri at menna seg til sjálvstøðugir persónar, sum taka ábyrgd av egnum lívi og øðrum við. Tað finst v.ø.o. ein natúrlig sosial dimensión í einum eftirskúla, sum er trupul at skapa í vanliga fólkaskúlanum. Hartil kemur, at ein vistarskúli, sum hevur næmingarnar 24 tímar um døgnið og 7 dagar um vikuna, hevur betri møguleika fyri at skipa undirvísingina øðrvísi og meira fjøltáttað enn tann vanligi fólkaskúlin. Ein vælvirkandi eftirskúli, sum bjóðar teimum skúlatroyttu næmingunum og teimum næmingunum, sum vilja taka t.d. 10. flokk umaftur fyri at betra um próvtølini, kann heilt vist vera ein partur av loysnini á teimum trupulleikum, sum miðnámsskúlarnir hava at dragast við - t.d. fráfall og vantandi førleikar. At ein tílíkur skúli í náttúruvøkrum umhvørvi í Hvalba hevur møguleikar fyri at gerast rættiliga spennandi fyri onnur enn føroyingar og eisini fer at vera við til at menna Suðuroynni, merkir, at hædd verður tikið fyri bæði lokalum og altjóða viðurskiftum við verkætlanini. Tað hevur ikki so lítið at siga í hesum tíðum, tá næmingarnir í størri og størri mun skulu fyrireikast til altjóðageringina. Her hevur ein eftirskúli møguleikar fyri

virka tværtur um landamørk og menna fakligt virkisfýsni, sosiala ábyrgd, altjóða førleikar og eitt námsfrøðiligt arbeiðslag, sum er torført at skapa í einum vanligum fólkaskúla.

Skal útbúgvingarvisjón Landsstýrisins røkkast, so er tað í øllum førum neyðugt, at nøkur tiltøk verða sett í verk alt fyri eitt. Eftirskúlin í Hvalba er eitt gott stað at byrja.